

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2011

# Stórur áhugi at skjóta seismikk

Ikki færri enn trý stór seismikkfeløg hava í summar skotið seismikk á føroyska landgrunninum. Ein hin størsta forðingin fyri at finna staðið at seta borin í føroysku undirgrundini fyri at finna kolvetni er og hevur verið basaltið. Hóast tøkniliga menningin hevur verið stór hesi seinastu árini, har bæði útgerðin og arbeiðshættirnir eru nógv betrað, so krevur leitingin við Føroyar nógvar seismiskar kanningar. Slíkar kanningar verða gjørdar á hvørjum ári fyri at staðfesta, hvar brunnar skulu borast. Og árið í ár er einki undantak í so máta. Hóast eingin boring er á føroyska landgrunninum í ár, so hevur kortini verið nógv virksemi her. Jarðfeingi hevur í ár latið ikki færri trý forkanningarloyvini (Prospecting Licence) til feløgini TGS, PGS og CGG Veritas. Hetta eru øll seismikkfeløg, sum hava gjørt kanningar á landgrunninum áður. Tvey av skipunum eru Bergen Surveyor og Sanco Spirit, sum hava verð um okkara leiðir í summar. ?At seismikkfeløg av sínum eintingum ella vegna oljufeløg brúka pengar og orku til at skjóta seismikk á landgrunninum, nú sjey brunnar higartil ikki hava givið nakað lønandi oljufund, kann tulkast sum at altjóða oljuídnaðurin framvegis heldur Føroyaøkið vera áhugavert. Myndatekstur - Bergen Surveyor á Vágsfirði í vár, meðan tað bíðar eftir betri líkindum. Mynd Jan Müller